# Eitt lukkuligt fólk

**SOSIALURIN hevur fingið bræv frá einum týskum áskoðara til dystin tann 11. juni millum Føroyar og Týskland. Hann fegnast um Føroyar og føroyingar og hartar sínar landsmenn, sum hann heldur hava far-ið illa við føroyingum í blaðnum Bild-Zeitung.**

### Háttvirda blaðstjórn

Tað er við gleði og skálkabrosi, at eg havi lisið oddagreinina "David og Goliat" í blaðnum hjá tykkum í farnu viku (11.6). Eftir tvær vikur í oyggjunum hjá tykkum – hjá mínum føroysku vinfólkum á Skála – má eg sanna, at tykkara orð bera sonn boð um hesar framúrskarandi eginleikarnar hjá tykkara landi og tess fólki: tað sunna sjálvfølilsið hjá føroyingum, teirra positiva bekennilsi til sín tjóðskaparliga identitet og teirra einastandandi blíðskap. Tit mugu vera eitt lukkuligt fólk. Eg vil fegin takka høvundanum at oddagreinini fyri hansara beinraknu og humoristisku orð.

Eg vil eisini siga, at eg eri harmur um tey niðursetandi, yvirflatisku og tápiligu orðini frá tveimum týskum starvsfólkum í sendinevndini hjá tí týska fótbóltsfelagnum, sum stóðu at lesa í BILD-Zeitung í farnu viku. Bæði úttalilsini hjá DFB-forsetanum Gerhard Meyer-Vorfelder og viðmerkingin hjá ítróttarjournalistinum Günter Netzer (sum sjálvur er ein framúrskarandi fótbóltsviðmerkjari) bera prógv um manglandi kunnleika til tykkara land, men eisini um eina framligheit, sum bara kann komast av býttheit og arrogansu. Eg havi upplivað stórar avrikanir hjá tykkara fólki, tað frálíka samferðslunetið, teir nógvu mentanarligu stovnarnar (serliga Norðurlandahúsið), fleiri av tykkara nógvu kunstnarum og tykkara fyrsta floks "Norrönu", og hetta alt hevur uppiborið høga viðurkenning. Eg veit, at nógvir av mínum landsmonnum hava hugt betur at tykkara landi enn hesir fótbóltsstarvsmenninir og tí kunnu geva eina rættari og hollari meting.

Eg heilsi tær vinaliga!

**Ernst Jordan**
**D-21256 Handeloh**
**Týskland**


UNSER LEITARTIKEL

David und Goliath

DAGSINS MEINING

David og Goliat

*Ernst Jordan, týskur fótbóltsáskoðari, ger viðmerkingar til oddagreinina, sum stóð á bæði føroyskum og týskum í blaðnum tann 11. juni*

# Bárður Johannesen á høkjum

**Málverjin hjá HB verður ikki við í dystinum móti KÍ í Klaksvík sunnudagin. Ein skaði í knænum hevur við sær, at hann gongur á høkjum**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*Bárður Johannesen meiddi sær knæið móti endanum av dystinum móti B36 mikukvøldið, og hann verður helst ikki tøkur til dystin móti KÍ sunnudagin*

*Savnsmynd*

– Tað sær ikki gott út. Hann gongur á høkjum, og eg rokni ikki við honum, nú vit fyrireika okkum til dystin móti KÍ, sigur Frank Skytte, venjari hjá HB, tá hann verður spurdur um støðuna hjá málverjanum Bárði Johannesen.

Eftir dystin mikukvøldið millum HB og B36 var ein maður liggjandi eftir í brotsteiginum hjá B36. Tað var Bárður Johannesen, sum var farin fram í hin brotsteigin í eini roynd at fáa útjavnandi málið, og í rokinum inni í brotsteiginum hevur hann fingið ein skaða í knæið.

Hann hevur meitt sær knæið so illa, at hann helst ikki verður við móti KÍ sunnudagin.

– Hann hevur verið til kanningar, og tað sær ikki út til, at nakað er brotið ella slitið, men knæið er hovið, og hann hevur pínu, sigur Frank Skytte.

### Pól fær møguleikan

Á bonkinum situr ungi og evnaríki málverjin Pól Næs Joensen, og hann stendur helst millum stólparnar í Klaksvík. Frank Skytte sigur, at hann er tryggur við at lata Pól standa í málinum, tí at hann er ein góður málverji, sum er svangur eftir spælitíð á 1. liði.

– Vit hava havt nógar skaðar í ár, men vit hava ein breiðan hóp, og tað hjálpir okkum ikki at grenja um tað, tí tað hendir hjá øllum liðum, sigur Frank Skytte.

# Norðurlendsk ungdómslega í Hoyvík

**Komandi vikuna verður norðurlendsk ungdómslega í Havn. Hetta er ein ítróttarlega fyri ung við tarni av ymsum slag. Setanin verður leygardagin í Hoyvíkar skúla, og hon er opin fyri almenninginum**



*Høllin og skúlin í Hoyvík verður komandi dagarnar karmur um norðurlendska ítróttarlegu fyri ung við tarni*

*Savnsmynd*

UNGDÓMSLEGA
*Stefan í Skorini*

Nógv ítróttarligt virksemi er innan ÍSB fyri tíðina. Mánadagin komu teir níggju luttakararnir aftur frá Special Olympics í Dublin, og komandi vikuna verður ein norðurlendsk ungdómslega hildin í Føroyum.

Fleiri enn sjeyti luttakarar úr Svøríki, Noregi, Danmark, Føroyum og Íslandi eru við á leguni, og teir skulu búgva í Hoyvíkar skúla. Allir leguluttakararnir hava okkurt tarn. Tey eru menningartarnað, rørslutarnað, blind ella sjónveik. Eingir leguluttakarar eru úr Grønlandi og Finnlandi, tí tey mettu, at kostnaðurin var ov høgur.

Leygardagin klokkan 14 verður legan sett. Setanin verður í samkomuhøllini í Hoyvíkar skúla, og hon er opin fyri almenninginum. Brandur Enni fer at syngja til setanina.

– Endamálið við eini slíkari legu er at knýta vinarbond og at styrkja tað norðurlendska samstarvið. Hetta verður gjørt við at íðka ítrótt saman, sigur Elna Skylv Hansen, ítróttarráðgevi hjá ÍSB.

### Venjingar og kappingar

Leguluttakararnir úr teimum ymsu londunum fara at venja saman, og síðani verður skipað fyri kappingum móti endanum av leguni.

Fýra ítróttargreinar eru á skránni. Í ítróttarhøllini í Hoyvík verður spælt boccia, í Eysturskúlanum venja tey borðtennis, úti á Frælsinum venja tey frælsan ítrótt og í svimjihøllini í Gundadali og í Eysturskúlanum fara leguluttakararnir at svimja.

Mikudagin kl. 15.30 verður so skipað fyri svimjikapping í høllini í Gundadali. Hon er eisini opin fyri almenninginum, og øll eru vælkomin at hyggja.

Hósmorgunin klokkan 9 verður so kapping í hinum trimum ítróttargreinunum. Tey, sum hava íðkað frælsan ítrótt, fara inn á Svangaskarð at kappast á breytini har inni. Í Eysturskúlanum verður borðtenniskapping, og í hoyvíkshøllini verður boccia.

### Annan ítrótt

Eisini sleppa luttakararnir at íðka annan ítrótt, so at tað ikki gerst ov einstáttað við tí sama ítróttinum hvønn dag.

Skipað verður soleiðis fyri, at tey eisini sleppa at rógva í føroyskum báti, gera judo, rýtmiskan fimleik. Hesar ítróttargreinar vera seinnapartar.

Hendan norðurlendska venjingarlegan er annaðhvørt ár, og seinast hon var í Føroyum var fyri fjúrtan árum síðani í 1989.




# Avloysarastarv

Søkt verður eftir fólki til starv á Dómaraskrivstovuni til setan skjótast gjørligt. Arbeiðstíðin er 32 tímar um vikuna. Setanartíðin er 5 mánaðir.

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:**
- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Skráseting á teldu
- Telefonavgreiðslu

**Førleikakrøv:**
Til starv krevst:
- Skrivstovuútbúgving ella hægri handilsskúli
- Góð evni at samskifta á føroyskum og donskum máli
- Telduførleiki á brúkarastøði
- Góð samstarvsevni

**Setanartreytir:**
Løn- og setanartreytir eru sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet. Setanarøkið fevnir um allar deildir á Dómaraskrivstovuni.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Jonni Dahl Hansen, yvirassistent, tlf. 31 10 03.

**Umsóknir:**
Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli skulu vera Dómaraskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. juli 2003.

**SORINSKRIVARIN Í FØROYUM,**
**tann 27. juni 2003**

**Henrik Møller**
**sorinskrivari**

INPACT

# Summarfrí

Skrivstova okkara verður stongd vegna summarfrí frá 10. juli til 4. august.

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar
Postrúm 191
110 Tórshavn
Tlf.: 31 47 00 - Telefax: 31 38 15
t-postur: inpact@inpact.fo

**Member of international Network of professional accountants**

# Teknmáls-tulkatænastan

er stongd vegna summarfrí frá 7. juli til 17. august.

Um brúk er fyri neyðtulking kann ringjast til tlf. 319012.

# Skúlavørður

Søkt verður eftir skúlavørði til Felagsskúlan á Oyrarbakka.

**Arbeiðið**
Arbeiðsuppgávurnar eru m. a. hesar:
- at røkja skúlan og økið uttanum
- at halda reint og ruddiligt inni og úti
- at hava umsjón við og samskipa reingeringina í skúlanum
- at syrgja fyri, at ljós, hiti og sanitetsviðurskiftini í skúlanum eru í lagi
- at gera umvælingar
- at hava umsjón við svimjihylinum
- at trygdarútbúnaðurin virkar sambært ásettum krøvum

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava handverkaraútbúgving, ella aðra útbúgving og starvsroyndir á økinum, skal duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett 1. august 2003. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meir fæst at vita**
við at venda sær til Hans Erland í Brekkunum, skúlastjóra tlf. 42 30 98
el. 22 98 85

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir og møguligum viðmælum skal vera Felagsskúlanum á Oyrarbakka postboks 20, FO-400 Oyrarbakki í hendi í seinasta lagi 15. juli 2003.

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**

# Felagsskúlin á Oyrarbakka

**Lýsing eftir lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2003/2004.**

Talan er um:
- 1 fulltíðarstarv – 27 lønartímar
- 2/3 starv – 18 lønartímar

Serliga er brúk fyri lærarum, sum kunnu undirvísa í 8.-10. fl. í alis- og evnafrøði, kunningartøkni og dreingjafimleiki.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

Fleiri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til skúlastjóran á tlf. 423098.

Umsóknir saman við ljósriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinsta lagi 8. juli 2003.

**Skúlastýrið fyri**
**Felagsskúlan á Oyrarbakka**
v/ Mariu í Skorini
470 Eiði

# Fíggjarleiðari

Fyri ein av kundum okkara søkja vit eftir fíggjarleiðara at byrja skjótast gjørligt.

Talan er um eitt áhugavert starv og fevnir um m.a.:

- dagliga bókhalds- og roknskapararbeiði
- mánaða- og ársroknskapir og fíggjarætlanir
- lønargjaldingar og framleiðslugreiningar
- og annars vanligt skrivstovuarbeiði í hesum sambandi.

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, og er tað avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og hóskandi teoretiskan kunnleika til skrivstovu-, roknskapar- og telduarbeiði. Kunnleiki til bókhaldsskipanina Navision Finansial er ein fyrimunur.

Fyri ein, ið kundi hugsað sær eitt sjálvstøðugt og fjøltáttað arbeiði við góðum arbeiðsviðurskiftum, er hetta tað rætta starvið.

Løn eftir avtalu.

Hevur tú áræði, kann virka sjálvstøðugt og hevur royndir innan bókhalds- og roknskaparyrki, við hóskandi ástøðiligari útbúgving, so er tú tann, vit søkja.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Joensen á tlf. 314700 ella 519472.

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum og ummælum verður at senda ***innan 21. juli 2003 til:***

INPACT
INTERNATIONAL

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar
R. C. Effersøesgøta 26 · Postrúm 191
FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 314700 · Telefax +298 313815
T-postur: inpact@inpact.fo

Søkt verður eftir

# tilkomnum fólki

við hug og hegni at arbeiða á gistingarhúsi.

Bládýpi
Dr. Jakobsensgøta 14–16
FO-100 Tórshavn
Tel.: (+298) 311951 · Fax (+298) 319451

# Handilsfólk

Vit sóknast eftir einum fólki til handil okkara at byrja hálvan juli.

**Pf. Johannes Andreasen**
Grønlandsvegur 16
110 Tórshavn · Tlf. 312087